


Brian Kerr:

# Eg KANN IKKI úttaka Sorin Anghel

**Føroyski landsliðsvenjarin, Brian Kerr, sigur seg avgjørt kunna brúka Sorin Anghel á føroyska landsliðnum, men enn kann hann ikki úttaka fyrrverandi rumenska U-21 landsliðsleikaran**

Tróndur Arge

- Sorin Anghel hevur ikki føroyskt pass og tí kann eg ikki úttaka hann, staðfestir Brian Kerr úr telefonini úr Írlandi.

Brian Kerr er í løtuni í Írlandi og hann koyrdi bil, tá sosialurin hitti hann yvir telefonina. Brian Kerr er skjótur at steðga bilinum, so hann kann práta ein løtu.

- Eg eri væl nøgdur við tað, sum eg havi sæð av Sorin Anghel. Hann hevur nógvar góðar eginleikar og kann spæla á fleiri plássum. Hann er avgjørt ein leikari, ið eg kann brúka á landsliðnum. Vit hava eisini fingið fleiri avboð frá royndum leikarum, so tað hevði komið væl við, sigur Brian Kerr.

## Torført at gerast føroyingur

Fyri at ein leikari skal kunna umboða eitt landslið, so skal viðkomandi leikari hava eitt pass, sum er frá tí landinum, ið hann umboðar. Hetta kannar dómarin undan hvørjum dysti.

- Føroyingar gera tað ikki lætt fyri útlendingar at kunna umboða Føroyar. Tað gert tú alla aðrastaðni, har familjutrø verða kannaði langt aftur, fyri at finna møguligar leikarar, ið kunnu umboða títt landslið. Tað hevur eisini gjørt nógv fyri at fáa pappír og líknandi ting uppá pláss skjótt. Í hesum førinum hugsi eg um Sorin Anghel og Alex Jose dos Santos fyri føroyingar, sum báðir ynskja at umboða Føroyar, sigur Brian Kerr.

> **Sorin Anghel hevur ikki føroyskt pass og tí kann eg ikki úttaka hann**
> BRIAN KERR

## Nøgdur landsliðsvenjari

Føroyska landsliðið skal 3. Septembur spæla ímóti Serbia á Tórsvølli, og fýra dagar seinni spæla vit ímóti Italia í Firenze. Brian Kerr er tí í holt við at gera úttøkuna klára, sum verður almannakunngjørd mánadagin 23. August.

- Tað verða fáar broytingar frá dystinum í Estlandi. Har var nógv gott at síggja og eg eri væl nøgdur við fleiri ting í tí dystinum, sjálvt um vit taptu. Vit manglaðu royndir og styrki, men vit hava nú skorað í teimum flestu av teimum seinastu undankappingardystinum. Tað er nakað vit hava arbeitt við seinastu tíðina og nú sær føroyska liðið altíð út sum at teir kunnu skora, sigur Brian Kerr.

## Kerr hevur U-21 landsliðið í huganum

Føroyska U-21 landsliðið skal spæla á útivølli ímóti Moldova 4. septembur og tað hevur Brian Kerr í huganum, tá A-landsliðið verður úttikið.

- Føroyska U-21 landsliðið hevur eina torføra og týdningarmikla uppgávu í Moldova samstundis sum dysturin ímóti Serbia. So eg má gera mær nakrar tankar um hvussu vit fáa tey bæði tingini at hanga saman, sigur Brian Kerr.

Til dystin í Estlandi hevði Brian Kerr ikki færri enn sjey leikarar í A-landsliðshópinum, ið hava aldur til at spæla á U-21 landsliðnum.

trondur@sosialurin.fo




Sorin Anghel:

# Eg veit ikki hvat eg skal gera

**- Um eg skal bíða tvey ár eftir einum passi, so kann alt gera tað sama**

Tróndur Arge

Soleiðis sigur Sorin Anghel sum fleiri ferðir hevur boðað frá, at hann fegin vil umboða føroyska landsliðið, um hann fær møguleikan. Eftir 9 ár hevur hann fingið permanent visum, men framvegis er einki pass í nándini.

## Strævin dystur

Tú skal hava búð í Føroyum í sjey ár, áðrenn tú kanst søkja um danskan ríkisborgararætt.. Tað gingu heili tvey ár, áðrenn pappírini um permanent visum komu uppá pláss, og tað var ikki uttan stríð.

- Eg havi strídst við at fáa ríkisborgararætt í fleiri ár og tað er strævið at hava við at gera einsamallur. Nú veit eg ikki hvat eg skal gera fyri at koma víðari. Eg havi spurt meg fyri, men ongin veit akkurát hvat eg skal gera nú, sigur ein ráðaleysur Sorin Anghel.

> **Eg havi strídst við at fáa ríkis-borgararætt í fleiri ár**
> SORIN ANGHEL

## Vil fegin hjálpa

Sorin Anghel hevur búð í Føroyum í skjótt 10 ár. Hann spældi sín dyst nummar 250 fyri EB/Streym, tá hann gjørdist "match-vinnari" í steypafinaluni í Klaksvík fyrr í mánaðinum.

- Eg vil fegin hjálpa føroyska landsliðnum um teir kunnu brúka meg. Ringir Brian Kerr til mín og sigur, at hann hevur brúk fyri mær, so sigi eg sjálvandi ja. Tað hevði verið ein dreymur. Men nú skilji eg einki, tí eg veit ikki hvat eg skal gera fyri at kunna umboða føroyska landsliðið, sigur ein nærmanst uppgevandi Sorin Anghel.

Sorin Anghel er í dag 31-ára gamal, so tað einki at siga til, at hann vil hava tingini uppá pláss skjótast gjørligt, 31 ár er ongin ungur fótbóltsaldur.

trondur@sosialurin.fo